gult cyan magenta svart



**ÓLAVUR HÁTÚN SJEYTI. Tónleikur er ein Guðs gáva, ið er umráðandi og átroðkandi at fáa út til fólk. Hetta metir eldsálin Ólavur Hátún, sum í dag, 17. februar, fyllir sjeyti. Men enn sum áður er tónleikarin og ígongdsetarin virkin. Maðurin, sum trívist best við nógvum jørnum í eldinum og sum ikki er bangin fyri at seta orð á og varskógva, um okkurt er, ið hann metir ikki er, sum tað eigur í samfelagsviðurskiftum. Tað eru ikki bert lovorð, ið hann eigur um viðurskiftini á mentanarpallinum í dag**

# Tónleikur hevur stóra ávirkan á mannasálina

SAMRØÐA

*Orð og myndir:*
*Dagfinn Olsen*

Tá um ræður lív og virki, so falla lívleiðir ymiskar og ymiskt er, hvussu hugur, evnir og heilsa renna saman í hægri eind.

Í dag fer ein virkin maður um tey sjeyti árini. Tað skerst ikki burtur, at seinastu hálvu øldina hevur hann verið ein eldsál í føroyskum mentanarlívi, serstakliga tónleiki og kórsangi, og talríkar eru tær ferðir og vitjanir, ið hann hevur verið við at fyriskipað og har lívslong vinabond eru knýtt.

Blaðmaðurin hevur leitað niðan á Heiðaveg í Havn, har vit hitta Ólav Hátún, har hann og konan Ása búgva, og har tey hava útsýni yvir Havnina og Nólsoyarfjørð.

Men lívsleið Ólavs byrjaði í Svínoy, har hann er føddur 17. februar í 1931. Hann er sonur Hjalmar og Brynhild Hátún, og pápin var lærari í Svínoy frá 1923 til 1938.



*Ólavur Hátún, sum í dag verður 70, hevur í orð og skrift ikki verið bangin fyri at standa við sítt. Ùtvarp Føroya kundi eins væl verið nevnt Jukebox Føroya, og í Sjónvarpi Føroya dansa tey Ormin Langa í valstakt!*

## Heim við klaveri

– Pápi var lærari í Svínoy og tað var eitt heim við nógvum tónleiki. Klaver var í húsinum, tað var sjáldsamt tá. Pápi spældi violin og tað var nakað av tí besta eg visti, greiðir Ólavur Hátún frá.

– Til stuttleika kann eg nevna, at tá tey merktu, at eg var kenslusamur fyri tónleiki, so var tað tá gramofonin fór í gongd. Mær dámdi væl gramofonina, men eg onkutíð fór at gráta. Tey løgdu til merkis, at tað var ein ávísur sangur, ið tað snúði seg um. Eg minnist lagið og útsjóndina á plátuni enn, hóast eg bert mundi vera eini 4 ár, og ikki kundi siga hvat og hvussu. Tað vísti seg, at lagið kallaðist Syrgimarsjur, minnist Ólavur Hátún.

– Pápi var virkin í tónleiki og hevði kór í Svínoy. Har vóru nógv fólk tá og hetta var kanska fyrsta bygdakór í Føroyum. Tá vit seinni fluttu til Kvívíkar, setti hann eisini á stovn kór har. Tað besta eg visti, vóru sangtímarnir og tað hendi seg, at um eg hevði forfall, so flutti hann sangtímarnar, so eg slapp at syngja, sigur Ólavur.

– Kór hevði pápi í Kvívík og klaverið stóð hjá okkum og onkutíð vóru venjingar í skúlastovuni. Eina árið komu tvær nýggjar altrøddir uppí. Tað vóru Ívar Iversen og eg, ið sungu av hjartans lyst. Sovikamarið var uppat stovuni og klaverið stóð við veggin, so tað hendi, at eg fekk lært allar røddirnar. Eg kann nevna, at tá vit komu til Havnar, so fekk pápi brúk fyri at syngja tjóðsangin, men nótarnir vóru burtur. Men eg hevði ligið í kamarinum og hoyrt og lært allar røddirnar, so á tann hátt fingu vit endurskapað sangin, minnist Ólavur, sum tá hevur verið eini 13 – 14 ára gamal.

## Højgaard var avgudurin

Pápin Ólavs, Hjalmar, gjørdist lærari í Havn, og setti á stovn kór, ið nevndist Frøi. Ólavur gekk á VBV. Har gekk Ólavur í flokki, 1.G, saman við Alex Sólstein, sum mong í dag kenna frá eittnú Føroya Symfoniorkestri.

– Tá kom hugskotið um at gera eitt kór og tað var fyrsta ferðin, at eg fekst við kór. Síðani var tað á Læraraskúlanum. Eg havi fjasast við kór so manga staðni. Eg kann nevna, at vit einaferð seinni fóru norður til Kvívíkar einar páskir at vitja Ívar Iversen. Vit sungu allir í kóri, so tað lá so væl fyri í so máta og gomlu kórlimirnir, sum pápi hevði havt, vóru eisini við. Seinni leiddi eg sangkórið í Kvívík. Seinni var eg lærari í Haldarsvík og har gjørdu vit Haldarsvíkar Sangkór. Í Oslo var eg á ítróttarháskúla og har skuldi veitsla vera, so vit fingu eitt kór á beinini, so eisini har havi eg fingist við kórsang. Á einum málskeiði í Týsklandi nevndi eg, at eg fekst við kór, og hesum var brúk fyri, so har var leyst og liðugt og eitt kór kom á beinini.

– Seinni gjørdist eg lærari á Toftum og ein stór uppgáva var at hava kór, eftir at Hans Jacob Højgaard hevði leitt kórið. Tað var eitt blandað upplivilsi. Har vóru góðir sangarar og tey høvdu traditiónir. Men alla tíðina var tann stóri Hans Jacob aftanfyri. Gekk mær væl, so var tað jú tí, at Hans Jacob, lærarin, hevði havt kórið! Gekk minni væl, so var tað jú munandi betri, tá Hans Jacob var, sigur Ólavur, tá hann í stuttum skal taka samanum sítt víðfevnda kórvirksemi.

– Men Hans Jacob var mín stóri avgudur, staðfestir Ólavur, sum seinni var lærari í Vestmanna og har stovnaði Vestmanna Sangkór. Ólavur hevði eisini ein fingur við, tá Vágakórið varð sett á stovn í 1970. Eitt skifti var eisini eitt kór í Norðstreymi, sum hevði limir úr Kollafirði, Kvívík, Hósvík og Hvalvík.

## Útvarpskórið og høvuðkambar

Ólavur starvaðist sum lærari ymsastaðni. Men Martin Holm eggjaði Ólavi til at fara á ítróttarháskúla, men hugurin til tónleikin var sterkur. Ólavur fór niður á lærarahaskúlan og segði starvið í Vestmanna frá sær og fór á tónleikakonservatoriið og tók útbúgving sum kórleiðari. Eisini í útisetaárunum var kór sett á stovn. Skipað var eisini fyri fyrsta sanglæraraskeiðnum í 1962 og førdi hetta til stovnan av Føroya Sanglærarafelag.

– Síðani kom eg heim aftur fyri jól í 1965. Útvarpsstjórin Niels Juel Arge og táverandi ábyrgdarmaður fyri tónleikinum, Ívar Iversen, høvdu hugsað um at fáa til vega fleiri føroyskar sangir. Tá kom hugsanin um at seta á stovn eitt útvarpskór. Tann 24. januar í 1966 var fyrsta venjingin við Útvarpskórinum. Tað gekk rættiliga væl við kórinum, minnist Ólavur.

– Men fyri at gera stutt av, so er at siga, at tá talan er um tveir høvuðkambar, sum Ólav Hátún og Niels Juel Arge, so kann standa á í samstarvinum, og tað brast so á heysti í 1969. Men kórið helt fram undir navninum Útvarpskórið. Og hóast samstarvið brast, má eg siga, at Niels Juel var altíð positivur fyri okkara arbeiði. Einki persónligt var í hesum. Gleðiligt er, at onkur av teimum, ið var við frá byrjan, er við enn, sigur Ólavur , og nevnir Kristinu Vesturklett og Úlv við Høgadalsá.

– Í 1972 valdu vit at broyta og tá sá Havnarkórið dagsins ljós. Alt hetta við Havnarkórinum er ein long søga, men alt er partur av hesum, sum er týdningarmikið fyri meg, at fáa sangin at trívast, sum eitt samfelagsaktiv. Tí hava vit eisini víðkað sangin á Tinghúsvøllinum á ólavsøku til eitt stórt tiltak, sum tað er blivið til í dag, sigur Ólavur Hátún.

Sostatt eru tvær orsøkir at halda dagin í dag. Ólavur verður sjeyti og Havnarkórið hevur sungið í 35 ár. Hetta verður hildið í Norðurlandahúsinum í dag klokkan 16 og Ólavur kundi ikki hugsað sær at hildið dagin á betri hátt.

## Undirvísing og ungdómur

Ólavur Hátún staðfestir, at kórsangur hevur havt, og hevur, stóran týdning fyri hann. Men annað, ið hevur havt stóran týdning, er undirvísingin í sangi og tónleiki.

– Eg havi lagt stóran dent á, at ungdómurin fær undirvísing í tónleiki. Eg hevði sjálvur havt samband við tað, ið nevndist Tórshavnar Musikkskúli. Í veruleikanum hevði hetta lítið við musikkskúla at gera. Tað var ein skúli, ið var eitt orkestur, og sum gjørdi stórt gagn við konsertvirksemi. Nógv góð fólk í Havn vóru við. Niðri á Lærarahaskúlanum greiddi ein maður frá, hvussu hann hevði bygt ein musikkskúla upp. Eg hugsaði, at hetta mátti roynast og eg royndi, men



tað gekk illa og eingin undirtøka var. Eg var í Svøríki og sá, hvussu tey har høvdu gjørt, m.a. hevði kommunan latið eitt hús fult av ljóðførum.Eg var á tal við deildarstjóran í danska mentamálaráðnum, og hann gav mær ráð, at gera ætlan við trimum stigum. Eitt fátæksligt, eitt miðal og eitt í stórum stíli. Men undirtøka fekst framvegis ikki og mong ár gingu og ung vuksu upp, sigur Ólavur.

## Søgufalsan

Ólavur minnist, at hetta var pínligt mál, ið stór togan var um. Og hann er avgjørdur í orð og tal:

– Eg kann væl siga, at nú er musikkskúlasøga skrivað í einum mentanarriti. Eisini er hetta komið uppí part í Tórshavnar Skúlasøgu. Men hetta er helst ótilvitað søgufalsan, sigur Ólavur, sum hevur lagt lív og sál í hetta mál, og hann metir, at mangt fór fram í hesum tunga og pínliga máli, ið ikki er hóskandi at koyra í søgubøkurnar.

Einki hendi, men ein dag sat ungur íslendingur í stovuni hjá Ólavi. Hann greiddi frá, at hann fekst professionelt við fótbólt í Gøtu, men var tónleikari, og vildi fegin undirvísa.

– Eg greiddi frá, at eg hevði roynt í eini 10 – 15 ár, men at striltið hevði gingist, men vit kundu gera enn eina roynd. Nýtt landsstýri var komið og Torbjørn Poulsen hevði mentamál og Eilif Samuelsen skúlamál. Tá kom royndarmusikkskúlin í gongd og breiddi seg út um alt land. Ein musikkskúlalóg kom, hóast hon ikki heilt fylgdi mínum hugmyndum, sigur Ólavur Hátún, ið ásannar, at her er ov mikið at oysa av, til at tað kann rúmast í hesi føðingardagssamrøðu.

Hann fegnast tó um, at hann var so heppin, at fáa starvið at realisera hugsanina, men tá hann fór í gongd, hevði hann ikki droymt um, at hann skuldi standa á odda í hesum starvi. Men Ólavur sá, at hugskotið var við at fara av sporinum, og royndi tí at gera sítt. Ólavur var Landsmusikkskúlaleiðari frá 1985 til 1998.

– Tað gekk strúkandi fyrstu árini. Vit komu uppá 44 lærarar. So komu trongar tíðir og vit fóru niður í lærarartali. Tað kann vera trupult at tosa um, tí persónlig viðurskifti stinga seg upp, sigur Ólavur, ið ásannar, at trupult var at halda uppi tónleikalívið kring landið, fór talið av lærarum niðurum 35. Hann ásannar, at skiftandi landstýri og landstýrisfólk komu til, og ilt var at koma fram við hugsjónunum.

Skúlin kom niður á tey 25 størvini og hevði als ikki ta ávirkan, sum hugsjónin var, nevniliga at skapa tónleikalív kring landið. Skúlin hevur staðið á sama stað til dagin í dag, men nú lýsir í.

–Eg hevði eina aðalhugsan, sum ongantíð kom ígjøgnum. Hjá okkum hevur musikkskúlin størri týdning, enn aðrastaðni. Hann skal rúma meira. Hugsanin var, at skúlin hevði eina umsiting í høvuðsstaðnum, ið syrgdi fyri, at skúlin var eins góður kring alt landið, sigur Ólavur. Ólavur metir tí alneyðugt, at musikkskúlin hevur tætt samband við fólkaskúlan kring landið.

## Okkara symfonikarar spæla ov lítið

Longu í sjeytiárunum, varð prátað um at stovna symfoniorkestur, en var hetta mett utopiskt, men við lærarunum, sum komu til musikkskúlan, lat hetta seg gera.

– Ein aðalhugsan var eisini at velja lærarar, við symfoniorkestrinum í huga, so eitt ríkt tónleikalív kundi fáast og kamartónleikur. Lærarar áttu eisini at fingið tilboð um at undirvísa og spæla í ávísum býti, heldur Ólavur.

– Sum nú er, ger Føroya Symfoniorkestur eitt sprell av og á, kanska á nýggjárinum, og føroyingar eru um at fara eftir hali: nei, sum vit duga væl!! Men har er fólk innflutt, og okkara egnu kýta seg nakrar dagar. Og so er onki!!! Síðsta heyst gjørdi Føroya Symfoniorkestur samstarv við Frændur. Frálíkt! Men hetta átti at verið vinstrahondsarbeiði, og ikki aðalinnihald í arbeiðinum alt heystið. Hetta er ikki nøktandi. Í fjør var ein konsert, har okkara ungu fólk vóru solistar. Tey ungu spældu sera væl, men symfoniorkestrið hevði ikki standard. Okkara tónleikarar hava ov fá høvi at spæla saman. Í Noreg hava teir tónleikarar, ið undirvísa og spæla helvt um helvt. Í Íslandi hava teir fleiri konsertir um mánaðin, meðan okkara spæla tvær ferðir árliga, staðfestir Ólavur Hátún.

– Villy Gohl segði um okkara tónleikarar, at teir spældu vánaligari og vánaligari. Føroyskir tónleikarar gjørdust sjálvsagt illir. Men tað, hann vildi siga, var, at teir spæla minni og minni og hava ikki møguleika at halda seg í formi, greiðir Ólavur frá um vinmannin Villy Gohl.

## Jukebox Føroya

– Mær dámar væl, tað, ið tíðin ber við sær. Men sum Útvarpið ber seg at, og sum tónleikur verður viðfarin har… Tað gnellur og gneggjar og dukar og Guð og hvør maður sleppur framat. Alt samdøgrið! Nógv við mær hoyra ikki nógvar sendingar, tí hetta kemur ímillum og tað gerst ov einsporað. Ein hugsan var, at musikkskúlin kom framat og tey við teirra bakgrund fingu ein møguleika. Hetta er ikki undirmeting av tí, ið kemur fram, men øll, ið fara undir eina fløgu, sleppa framat, hóast nógv er nakað verri rusk. Sagt verður, at tónleikur, ið ikki byggir upp, hann brýtur niður! Eg sigi ikki, at bert gamal tónleikur skal spælast, men tað er ikki rætt at halda hann uttanfyri, metir Ólavur Hátún, ið kennir seg staðfestan í hesi útsøgn av vitjandi tónleikarum, ið undrandi spyrja, hvat tað er fyri tónleikur, ið vit hava.

– Rættast hevði verið at nevnt tónleikapartin í ÚF fyri Jukebox Føroya! Eisini í Svf er nógv minni at hoyra av tónleiki, enn áður, hóast teirra møguleikar at koma í hvørja einastu stovu við opera og ballet. Tónleikur hevur so stóra ávirkan á mannasálina. Ringt er at seta orð á góðsku. T.d. veit ein ikki, hví okkum dámar The Beatles. Tað er bara so, sigur Ólavur, sum eisini hevur fingist við barnakór og sum eigur sín stóra lut í, at stórverk eru komin á føroyskan pall.

Ólavur ásannar, at vit hava góðar kórrøddir, men verri er at fáa til vega tað, ið ger eitt kór ella eina hending, – oftast pening. Hann nevnir Atlantsljóm, har hann vónar, at slíkar hendingar kunnu vera við at hækka støðið í føroyskum tónleika- og kórlívi.

Ólavur hevur í mong ár verið formaður í Kórsambandi Føroya.

– Tað síðsta, eg havi verið við til, er eitt skeið fyri kórleiðarar. Mangir eru ótryggir og hava ikki útbúgving, sigur Ólavur Hátún, ið greiðir frá, tá telefonin brádliga ringir og blaðmaðurin hoyrir Ólav hegnisliga greiða viðkomandi í horninum frá, at tað snýr seg um eitthvørt, ið skal vera í G-dur.

Møguleiki er, skilst, fyri at knýta føroyskar kórleiðarar at danskari undirvísingarætlan og at fáa teir at taka prógv har.

Ólavur er við í verkætlan, ið hevur til endamáls at seta á stovn sangskúla.

– Tað gerst so nógv við fólkinum. Føroyingar syngja nógv. Tað ræður bert um at fáa hetta sett í skipan, sigur Ólavur.

## Ormurin í valstakt

Ólavur er sera glaður fyri, at ungdómurin vísir kórsanginum ans. Hann nevnir Sunleif Rasmussen, Paula í Sandagerði og Trónd Bogason, ið eisini hevur havt føroyska dansin í huga í sínum tónleikaverkum.

Blaðmaðurin kann ikki halda sær, men má varisliga spyrja Ólav um metingar, nú Prix Føroyar er farið um sjónvarpsrútin við tungum rockrútmum og Orminum Langa, og Ólavur sjálvur hevur nýtt kvæðini í kórhøpi.

– Givið er, at ein kraft er í kvøðingini, sum brúk er fyri í kórtónleiki, uttan at tað spillir fyri dansin. Har m.a. hevði Trondur gjørt nakað so frálíkt. Tann, sum byrjaði, var Hans Jacob Højgaard. Síðani setti Vagn Holmboe út fyri kór. Tað týdningarmesta er at geva dansinum ein møguleika at liva víðari. Har kemur framhaldsdeildin og ungdómurin við. Eg eri sjálvur við í eini ætlan í Vestmanna Skúla viðvíkjandi føroyskum dansi. Eg kann siga, at ein upplivir nógv betri dans í dag, enn fyri árum síðani, metir Ólavur Hátún.

– Tað skaðar ikki, um ein nýtir dámin í dansinum. Tað er ein dynamikkur, ið er okkara, og sum kann koma øðrum tónleiki til góðar. Til dømis er gjørt um uppá »Nú gerast kvøldini myrk og long«-…donk!! Og so ger alt landið »donk«. Tað er ikki gott! Herfyri kvóðu tey í Svf Ormin Langa í valstakt. Og tónin fór upp í hvørjum versi – ikki ektað og uttan kenslu fyri kvøðing. Her var galið, og nýtir ein lagið, so má ansast eftir, at ein ikki skeiklar í tí, metir Ólavur, ið samstundis minnist mangar framførslur, ið staðfesta, at føroyski dansurin hevur eina kraft og hann fangar.

## Framtíðin

Ólavur metir, at framtíðin er ljós. Men føroyingar mugu ikki steðga við lýsingar frá Microsoft og Coca Cola, ið siga, hvat vit skulu hava.

–Vit mugu ikki steðga, hóast tað ljóðar, at vit nú hava minst 30 bólkar, ið bæði skriva orð og løg . Tey eru beinanvegin ein »star«. Okkara egni sonur var við í bólki, ið fór við í kapping. Hóast Mark No Limits einki høvdu spælt, so vunnu tey. Vit hava fólk, sum veruliga hava serligar gávur . T.d. Sámal Petersen og Jóhannes Andreasen, ið hava valt at útbúgva seg og hava nýtt eini 8 – 9 ár til at útbúgva seg. Knappliga er ein nýggj stjørna, meðan hesi fólkini liva eina skuggatilveru. Tað koma døgnflugur upp, koma upp og fara. Finna tey gávaðu fólkini ikki vegin til útbúgving, so steðga vit upp, metir Ólavur, ið ikki undirmetir nýggjan tónleik og nógva virksemið á økinum, men sum ikki metir, at hetta skal skugga yvir onnur, ið fara álvarsliga til verka við tónleikinum.

Ólavur metir samanumtikið, at í Føroyum arbeiða vit ov nógv hvør sín veg, so at fíggjarliga orkan røkkur ikki, men hann vónar, at so við og við búnast hetta.

Ólavur hevur hugsjón um meira samansjóaða hugsjón í mentanarligum høpi, har tónleikur, myndlist og annað rennur saman. Hann metir, at peningur, ið kirkjur, musikkskúlin og onnur í dag nýta til smærri ætlanir, hevði verið betri farin við eini størri eind.

– Tey stóru oratoriini eiga at vera framførd t.d. í Vesturkirkjuni og øðrum stásiligum kirkjum, men peningur er ikki til. Aðrastaðni verður peningur settur av til til slíkt, og einki galið er í at taka pening fyri tónleikatiltøk í kirkjum, ein og gjørt verður aðrastaðni, sigur Ólavur, sum tó á ongan hátt undimetir Norðurlandahúsið, sum hann metir hava alstóran tydning fyri føroyska mentan, størri týdning, enn so manga aðrastaðni.

– Onga aðrastaðni hevur slíkt hús so stóran týdning fyri eina tjóð, metir Ólavur.

– Lyndið er ov mikið merkt av, at vit eru føroyingar, og tí má tað ikki vera nakað, sigur Ólavur, og kemur við talríkum dømum um ætlanir, ið ikki gjørdust veruleiki, orsakað av smáligum toganum, og nevnir, at í dag eru nógvar góðar urgur í Føroyum, men eingin fullgóð. Og organistar eru nærum eingir og eingin almennur peningur til undirvísing, staðfestir Ólavur, og hyggur hugafjarður yvir Tórsvøll úr stovuvindeyganum, har vit sita.

Sjálvur var Ólavur heitur talsmaður fyri øðrvísi ætlanum í Gundadali og gjørdi vart við hetta í bløðum og við innsavnan av undirskriftum frá skúlastjórum í kommununi.

Vit sita og hyggja yvir Havnina úr stovuvindeygum og hugleiða og fara víða. Frá útvarpsrøddum til kórrøddir. Men rundi dagurin hjá eldsálini á Heiðaveg verður hildin á ein hátt, ið er hóskandi.

– Havnarkórið hevur sungið í 35 ár. Kórið er stórur partur av mínum lívi, so eg kundi ikki hugsað mær dagin betri, sigur Ólavur Hátún, sum úr stovuvindeyganum sær yvir Havnarvág, Gundadal og Norðurlandahúsið, har rundu dagarnir hjá Ólavi og Havnarkórinum verða hildnir klokkan 16 í dag.









gult cyan magenta svart